# YNDAFÓLKIÐ
# tóra dagin







## Miriam og Janus Gunnarsson

www.miriamjanus.com

**Hvar taka tit tykkara myndir?**
- Vit dáma best um vit kunnu hitta parið áðrenn brúdleypsdagin, so vit kunnu læra hvønn annan at kenna. Á brúdleypsdegnum eru vit við frá fyrireikingunum til veitsluna. Vit arbeiða altíð saman og fáa tí nógv við av tí sum hendir.

**Hvussu nógv kostar tað at taka myndir hjá tykkum?**
- 12 tímar við tveimum fotografum á brúdleypsdegnum kostar 12.000 krónur. Fýra tímar kosta 6.000 krónur. Parið kann velja millum trý album, tey kosta úr 6.000-12.000 krónur.

**Hví hava tit valt hesar myndirnar?**
- Vit hava altíð trupuleikar at velja fáar myndir út. Men vit føla okkurt serligt fyri hesum myndunum hóast at tær eru rættuliga ymiskar.